Kommunufelagið

Til Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting
08. november 2022

Okkara j.nr.
22/05969

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.

**Viðv.: Uppskot til løgtingslóg um bókasøvn**

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur 11. oktober 2022 sent Kommunufelagnum uppskot til løgtingslóg um bókasøvn til hoyringar. Hoyringarfreistin er 8. november 2022.

Uppskotið hevur verið viðgjørt á stýrisfundi í Kommunufelagnum í tveimum umførum.

**Ógreitt uppgávubýti staðfest**
Í staðin fyri at leggja upp til eitt greiðari uppgávubýti millum land og kommunur, staðfestir uppskotið eitt ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti, sum frammanundan er á bókasavnsøkinum.

Í øðrum lagi gevur uppskotið landsstýrismanninum høvi til at stýra kommununum niður í smálutir, eins og uppskotið enntá heimilar landsstýrismanninum at geva kommununum beinleiðis kravboð (instruksir), sum vóru kommunurnar og kommunalu fólkabókasøvnini undirliggjandi stovnar hjá landsstýrismanninum.

Slíkum uppskoti kann Kommunufelagið av góðum grundum ikki taka undir við.

**Uppskotið**
Sambært uppskotinum hava allar 29 kommunurnar **skyldu til** at hava bókasavn, um ikki sjálvstøðugt, so skulu tær gera samstarv við aðrar kommunur um at hava bókasavnstænastu. Bókasøvnini **skulu** hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving í starvi. Kommunur, sum hava bókasavn, men ikki starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving, **skulu** eisini ganga í samstarv við aðra kommunu, sum hevur starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving í starvi. Harumframt eru í kapitli 3, (§ 5 - § 10) ein røð av ásetingum um, hvat kommunurnar skulu.

Í § 6, stk. 9 er harumframt ásett, at landsstýrismaðurin kann geva **kommunum og stovnum nærri boð** um skyldur viðvíkjandi fólkabókasøvnum, og í § 7 er ásett, at landsstýrismaðurin eftir tilmæli frá Landsbókasavninum kann **geva kommunum boð** um at fáa hølisviðurskiftini í rættlag innan fyri nærri ásetta freist.

Kommunufelagið kann ikki taka undir við, at lóggivið verður á slíkan hátt. Okkum kunnugt er tað eisini púra uttan fordømi, at ein landsstýrismaður fær heimild at geva kommununum boð

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

Kommunufelagið

– bæði í heila tikið, men serstakliga í mun til viðurskifti so sum íløguraðfestingar, ið fult og heilt eru undir kommunalum málsræði.

Kommunufelagið minnir í hesum sambandi á, at viðurskiftini millum landsmyndugleikarnar og kommununar grundleggjandi ikki eru yvir- og undirskipað. Landsstýrismaðurin og hansara fyrisiting hava ikki uttan víðari heimild at geva kommununum boð á sama hátt, sum annars er galdandi í viðurskiftunum millum landsfyrisitingina og stovnar undir landinum.

**Ábyrgdarbýti higartil**
Kommunufelagið hevur í samskiftinum við Uttanríkis- og mentamálaráðið bæði fyrisitingarliga og politiskt mælt til, at kommununar taka fulla ábyrgd av fólkabókasøvnunum, og at tær 2,884 mió. kr., sum í dag verða veittar sum stuðul, permanent verða fluttar kommununum sum ein partur av eini fíggjarligari uppgerð. Kommunufelagið hevur mótvegis Mentamálaráðnum víst á fleiri møguleikar, hvussu hetta kann gerast m.a. við regulera onkra av mongu fíggjarligu flytingunum, sum eru millum kommununar og § 7 mentamál.

Tað er ein sannroynd, at stuðulin frá landinum lutfalsliga bert er minkaður seinnu árini.

Í 2005 var rakstrarjáttanin til fólkabókasøvn 5,174 mió. kr. Í 2006 lækkaði játtanin til fólkabókasøvn til 3,474 mió. kr., og í 2013 niður í 2,844 mió. kr. Síðani hevur hon staðið í stað.

Samlaða játtanin til fólkabókasøvn er í dag omanfyri 20 mió. kr. Kommununar fíggja sostatt umleið 85 % av samlaðu útreiðslunum, meðan landið fíggjar umleið 15 %.

Allur framburður og øll menning á fólkabókasavnsøkinum seinastu 20 árini hava sostatt verið fíggjað av kommunukassunum. Fyriliggjandi uppskot leggur upp til, at hesin leistur heldur áfram. Landskassastuðulin stendur í stað á 2,884 mió. kr., tann sami sum hann var í 2013 og ikki stórt meir enn helvtin av tí, sum hann var í 2005.

Einasta broytingin er, at henda lítla upphæddin nú skal býtast út eftir fólkatalinum til allar 29 kommununar í landinum, sum allar hinvegin fáa álagt at hava eina bókasavnstænastu undir strongum eftirliti av Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

Eisini er vert at gera vart við, at stuðulin til kommununar nú er tikin úr lógartekstinum, og soleiðis ikki er lógarásettur longur. Stuðulin skal nú í staðin ásetast árliga á landsins fíggjarlóg. Hetta hevur við sær, at stuðulin helst verður niðurlagaður sum frálíður. Tað er tí rættiliga óvist um kommununar yvirhøvur kunnu rokna við nøkrum stuðli frameftir.

**Onnur skipan við greiðum ábyrgdarbýti**
Kommunufelagið tekur ikki undir við uppskotinum, sum tað fyriliggur. Heldur enn at greiða ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, staðfestir uppskotið eitt ógreitt fíggjarligt uppgávubýti millum land og kommunur.

Kommunufelagið

Kommunufelagið mælir til aðra skipan, har ábyrgdin av fólkabókasøvnunum verður kommunal og skipað eftir eini rammulóg, sum gevur kommunum frælsi og karmar at menna økið.

Samstundis eigur fíggjarligi stuðulin, sum í dag verður fluttur kommununum, at verða avtikin, og ein upphædd, svarandi til hendan stuðulin, at verða flutt kommununum á annan hátt.

Vegna
Kommunufelagið

Heðin Mortensen
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**